# Rás 2 leggur seg nú eftir Klaksvík

*Nýggja útvarpsstøðin metir tað verða týðandi stig at fara undir at senda til og úr Klaksvík, men enn er ikki greitt at vaksa um sendiøki*

Eyðun Klakstein

Partur av upprunaligu ætlanini hjá Rás 2, sum nú rættiliga hevur lagt upp til kapping við útvarpsrisan Útvarp Føroya, var at senda til Klaksvíkar.

Í løtuni hoyrist Rás 2 í høvuðsstaðnum, á Skálafjørðinum og onkra aðrastaðni í Eysturoynni. Enn er Klaksvík ikki komin við í sendiøki, men stendur tað til leiðsluna í Rás 2, gongur ikki lang tíð, áðrenn teir eisini kunnu senda til høvuðsstaðin hjá norðoyingum.

– Vit arbeiða við fleiri møguleikum í løtuni, men enn eru vit ikki komin á mál. Vit leggja dent á, at vit skulu hava Klaksvík við innan stutta tíð, sigur Suni Jacobsen, sum er stjóri á Rás 2.

Rás 2 hevur akkurát sett fleiri fólk at taka sær av sendingunum hjá rásini, og næsta stóra stigið, sum rásin ætlar sær at taka, er at senda til og úr Klaksvík.

– Vit gera í løtuni nakað av tilfari av Skálafjørðinum, og tá vit fara at senda til Klaksvíkar er tað upplagt, at vit eisini fara at gera tilfar haðani, sigur Suni Jacobsen.

Tað hevur ljóðað, at Rás 2 skuldi samstarva við Studio Pegasus í Klaksvík, men hendan ætlan tykist verða meira óverulig, enn hon hevur verið. Tí liggur tað í kortunum, at Rás 2 fer at útvega sær ein sendara og sjálvt senda til og úr Klaksvík.

Sosialurin hevur skilt, at onnur arbeiða við at fara undir at senda útvarp í Klaksvík, men hesar ætlanir eru ikki komnar so langt ávegis, at tað ber til at fáa nakað ítøkiligt upplýst um tað.





# Atlantsflog flúgva millum ES-lond

*Í mars mánaði fer Atlantsflog at flyta ferðafólk millum Aberdeen og Keypmannahavn*

Eyðun Klakstein

26. mars fer føroyska flogfelagið fyri fyrstu ferð undir regluliga flúgving millum tvey ES-lond. Nýggja flogleiðin er millum skotska býin Aberdeen og danska høvuðsstaðin Keypmannahavn.

Atlantsflog hevur áður flogið regluliga millum hesar býir, men felagið hevur ikki havt loyvi at flyta ferðafólk millum londini. Bretar hava givið loyvi til tess, men nústandi hava donsku myndugleikarnir sagt ja.

– Vit rokna ikki við at flyta nógv ferðafólk millum Aberdeen og Keypmannahavn, men vit vóna, at flúgvingin kann verða eitt ískoyti, tá vit nú alíkavæl flúgva úr Aberdeen til Keypmannahavn, sigur Magni Arge, stjóri í Atlantsflog.

Atlantsflog hevur áður havt regluliga ferðslu millum Føroyar og Aberdeen, og tað er í hesum sambandi, at føroyska flogfelagið eisini hevur flogið úr Skotlandi til Danmarkar.

– Nýggja leiðin fer ikki at ávirka flúgvingina millum Føroyar og Danmark, tí tann leiðin er tann týdningarmesta hjá okkum, og hon skal røkjast væl, sigur Magni Arge.

**Tíðliga á morgni og seint á kvøldi**

Tá farið verður undir nýggju leiðina í mars mánaði verður flogið tvær ferðir um vikuna millum Skotland og Danmark. Týskvøld og hóskvøld verður flogið úr Aberdeen til Keypmannahavn, og mikumorgun og fríggjamorgun verður flogið úr Keypmannahavn til Aberdeen.

Ferðaseðilin millum Skotland og Danmark fer at kosta nakað meira enn ferðaseðilin millum Føroyar og Danmark.

Flogfarið hjá Atlantsflog kemur úr Aberdeen til Keypmannahavn seint á kvøldið týsdag og hósdag, og tí roknar Atlantsflog ikki við, at fólk, sum skulu ferðast víðari úr Keypmannahavn, fara at brúka teirra farleið.

Sama skil er, tá Atlantsflog flýgur úr Keypmannahavn og til Aberdeen tíðliga mikumorgun og fríggjamorgun. Tá eru fyrstu ferðafólkini, sum kanska skulu flúgva víðari til Skotlands, ikki komin úr øðrum londum og til Kastrup. Hetta er tann sokallaði "connection"-ferðslan, sum Atlantsflog neyvan fær stóran lut í.

**Møguleikarnir**

Í Danmark og kanska serliga Aberdeen eru fólk spent uppá nýggju flúgvingina hjá Aberdeen. Bretska ferðaráðið hevur verið við til at sligið á junglutrummurnar fyri leiðini hjá Atlantsflog, og í skotsku avísini Press and Journal verður mett, at Atlantsflog ætlar sær at gera sær dælt av stóra áhuganum fyri eini oljuvinnu í Føroyum.

Men møguleikarnir fyri øktari samvinnu millum landnyrðings-Skotland og Danmark eru eisini viðvirkandi til, at Atlantsflog fer undir nýggju flúgvingina.

Brúgvin um Oyrasund fer at hava stóran vøkstur við sær í Keypmannahavn, og eisini tann búskaparligi vøksturin kann fara at koma farleiðini hjá Atlantsflog til góðar, heldur Press and Journal.

# Tónleikagrunnurin farin at virka

*Fyrstu umsøknirnar eru komnar til tónleikagrunnin hjá Norðoya Sparikassa, og nógvir fyrispurningar hava verið, síðani grunnurin var settur á stovn*

Eyðun Klakstein

Fyrsta dagin í hesum árini fór Tónleikagrunnur Norðoya Sparikassa alment at virka.

Fyrstu umsøknirnir eru longu komnar til grunnin, og nógvir fyrispurningar hava verið, síðani sparikassin á føðingardegi sínum í heyst setti nýggja grunnin á stovn.

– Vit eru rættiliga spentar uppá at finna út av, hvønn leiklut nýggi grunnurin fer at fáa, sigur Gunnar Nolsøe, sum er marknaðarleiðari í Norðoya Sparikassi. Saman við honum sita tvey onnur starvsfólk í sparikassanum í nevndini fyri grunnin.

Norðoya Sparikassi er ikki sinnaður at upplýsa, hvussu nógvar umsøknir eru komnar, ella hvussu nógvar pengar grunnurin hevur at ráða yvir. Men ein sekssiffrað krónuupphædd er í grunninum.

– Umsøknirnar, sum vit hava fingið, eru fjølbroyttar, og tær snúgva seg um nógv annað enn bara um stuðul til fløguútgávur, sigur Gunnar Nolsøe.

– Harafturat hava vit havt nógvar fyrispurningar, og teir fara ivaleyst at hava við sær, at vit fáa enn fleiri umsøknir hendan mánaðin.

**Fáar men munagott**

Fyrsta freistin fyri at lata grunninum umsøkn um stuðul er 1. februar. Allar umsøknirnar verða so viðgjørdar áðrenn næstu tíðarfreistina, sum er 1. juni, og triðja freistin á árinum er 1. oktober.

Norðoya Sparikassi ætlar at tónleikagrunnurin skal lata stuðul til ymisk tónleikalig endamál, tað veri seg marknaðarføring, útbúgving ella onnur tiltøk, sum hava samband við tónleik.

– Reglugerðin gevur okkum møguleika at lata stuðul til alskyns ætlanir, sum hava við tónleik at gera, men vit fara at halda fast um tann poltikk, at vit játta stuðul til fáar umsøknir. Tá vit lata stuðul, verður tað við eini upphædd sum veruliga munar, sigur marknaðarleiðarin í Norðoya Sparikassa.

Reglugerðin fyri Tónleikagrunn Norðoya Sparikassa er at finna á heimasíðuni hjá sparikassanum.




